Skrivlig prótvøka, 9. flokkur
MAI - JUNI 2009
FØROYSKT

Mynd frá Google

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 **Fartelefonin - brúk ella misbrúk? (síða 2-3)**

2 **Maria (síða 4)**

3 **Einsemi (síða 5)**

4 **At snýta seg vakran (síða 6-7)**

5 **Gandakallurin (síða 8)**

1

Fartelefonin - brúk ella misbrúk?

- Við støði í tekstinum skalt tú siga tína hugsan um fartelefonina sum samskiftistól.

Hav yvirskriftina í huga!

At fartelefonin stýrir okkara gerandisdegi, eru tað mong, sum kunnu taka undir við. Tey flestu eru vorðin so knýtt at telefonini, at ringir hon, so verður alt lagt til síðis fyri at taka hana - óansæð tíð og stað. Telefonin er vorðin partur av okkara persóni.

Ofta tá eg í mínum ungu døgum ringdi til eina ávísa vinkonu hjá mær fyri at spyrja um eitthvørt, kom tað fyri, at telefonin ikki varð tikin. Hetta var ikki, tí at tey høvdu nummarvísara, ella tí at eingin var heima, nei, tey høvdu tikið stikkið úr! Fekk man fatur á foreldrunum, og vinkonan ikki var heima, ja, so bað man tey leggja boð um, at man hevði ringt, so at hon kundi ringja aftur. Tað gjørdu tey bara ikki altíð, og soleiðis kundi tað gott taka ein dag, áðrenn man fekk telefoniskt samband við hana.

Eg ivist í, um ungdómurin í dag hevði funnið seg í hesum. Uttan heilt at vera vís í tí, so haldi eg, at tað í dag gongur fyri seg nakað soleiðis: 1) Eg sendi eitt sms. 2) Um eg ikki havi fingið svar innan 20 minuttir, so ringi eg. 3) Um telefonin ikki svarar, so ringi eg á heimatelefonina. 4) Um har heldur ikki svarar, so ringi eg til sjeikin hjá henni ella aðra vinkonu og spyrji, um tey vita, hvar hon er. 5) Um eingin teirra veit, ja, so er tætt við, at eg ringi til løgregluna fyri at seta eina leiting í gongd. Nei, kanska ikki tað síðsta, men tað táttar í at vera so galið. Og alt, sum eg vil, er at spyrja hana, hvør man hava bindiklubb í næstu viku, ella onkran annan líkagildigan spurning.

Á fundum sita fólk bert hálv, tí at telefonin hevur fingið lov at vera við sum aktivur fundarluttakari. Fer man í býin við vinfólki, so er telefonin altíð við, og nógv av tíðini verður brúkt til sms ella samrøður við fólk, sum av onkrari orsøk ikki valdu at koma við, fyri at halda tey kunnað um, hvat ið fyriferst. Sum undirvísari upplivi eg meira enn so, at telefonin hjá næmingunum ringir í tímanum - og teir taka hana! Og enn verri, tað er eisini komið fyri, at eg geri tað sjálv. Og soleiðis kundi eg hildið áfram. Vit kenna tað øll, og vit ilskast øll um tað. Men tað tykist ikki at hjálpa, telefonin er blivin partur av okkara persóni - um vit vilja tað ella ikki.

Mynd frá Google

Hvat er tað, sum er broytt eftir so stutta tíð? Hvat er tað, sum ger, at vit ikki longur virða okkum sjálv og tey rundan um okkum so mikið, at vit ikki vilja vera heil, har vit eru? Hvat sigur tað ikki nógv, at prestur í kirkjuni noyðist at biðja okkum sløkkja fartelefonina, ella at man í barnagørðum biður foreldrini koma inn at avheinta børn teirra uttan tendraða telefon.

Eg kann ikki lata vera við at spyrja, hvat verður tað næsta? Hvussu nógv skal telefonin sleppa at stýra okkum, uttan at vit av álvara seta spurnartekin við, um hetta er rætt? Er tíðin ikki komin til, at vit stinga fingurin í jørðina og spyrja, um hetta gagnar okkum? Ella enn betur, at vit taka stikkið úr av og á!

Sissal Kj. Kristiansen, punktum.fo
15. mai 2008



Mynd frá Google

2 Maria

- Greina og tulka yrkingina.
- Sig tína hugsan um tað at vera ungur.

Maria

Fyrstu ferð eg sá teg, tað var ein summardag,
tú komst rennandi ímóti mær so glað.
Títt langa, myrka hár í vindinum sum lín,
eg minnist, at eg ynskti tú vart mín.

Og vit hildu saman, men bert í stutta tíð.
Eg sveimaði á skýggjum, tú vart so fitt og blíð.
Men tú vildi liva lívið, tú vildi vera frí,
og áðrenn eg visti, vart tú ei longur mín.

Farvæl Maria! Farvæl og takk fyri tað, tú var',
úr okkum báðum spurdist einki par,
men takk, takk Maria!

Árini tey gingu, men eg gloymdi ikki teg,
og ein dag møttust aftur tú og eg.
Ein nálamerktan arm, tú rætti fram og bað:
"Eitt oyra til mat, sýt mær ikki tað!"

Eg nevndi teg við navni, eg gav tær tað, tú bað.
Tú orkaði ikki at svara, men fór grátandi avstað.
Í kvøld áðrenn konsertina, fekk eg tey tungu boð,
at tú vart deyð, hví skuldi tað enda so?

Eg fekk ikki sitið her, eg mátti út
at fáa linna fyri mína sút.
Regnið fjaldi tárini, og gott var tað,
ongin skuldi síggja, at eg græt.

Tað byrjaði í spølni, men tú dugdi ikki hógv,
prísurin var høgur, tú mátti gjalda nógv.
Men Maria, eg vil minnast teg,
sum tú vart tann summardag,
tú komst rennandi ímóti mær so glað.

Farvæl Maria! farvæl og takk fyri tað tú var',
úr okkum báðum spurdist einki par,
men takk, takk Maria!

Eftir Hans Inge Fagervik, Noreg (1981)
Einar Petersen, umsetti
Kim Hansen, syngur

3

Einsemi



4

At snýta seg vakran

- Skriva um evnið.

Stramman búk uttan venjing

Abdosculpt: 269,-

Kvinnur hava nýtt tað í fleiri ár, og nú er tað endiliga eisini komið til menn. Uppstrammandi krem til dellur og húðina á búkinum, sum tyngdarmegin hevur fingið tak á. Skal smyrjast á búkin og minkar um feittlagið, samstundis sum tað strammar húðina upp.

Make up til menn...

...Jú, nú er eisini smink... mannfólk at fáa. Hetta... uttanlands, og er so sv... farið at selja hei heim... skulu tað bert vera ka... kunnu snýta seg vakr... spildumyggja... make-up til m... Biotherm, og... Heilsu

Rættir menn ...

... ansa sær eftir húð og útsjónd

Varrar:

Varrarnar skulu vera í kraftigum liti, t.d. reytt ella pink. Eitt gott ráð er at keypa varrastiftir við køldum undirtóna, tí so gerast tenninar hvítar. Er undirtónin heitur, gerast tenninar gular. Til um dagin er gott við lipgloss við reyðum liti í, so tað ikki verður so ógvusligt.

Unisex sjálv-brúnara-serviettar

Ætlar tú at fáa eitt sindur av liti í vetrarmyrkrinum, er sjálvbrúnari ein uppløgd loysn. Comodyne eru serviettar við sjálvbrúnara – ætlaðir bæði konu-og mannfólki, og teir fara væl við húðini.
10 serviettar fáast fyri 85,-, men teir kunnu eisini keypast einkultvís fyri 15,- í Drós

5

- Sig eina søgu, sum hóskar til myndina.
- Tú kanst gera egna yvirskrift.

Gandakallurin